

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 11 - 2011

# Oljuprísurin upp í morgun

Oljuprísurin hækkaði, tá marknaðirnir í Asia lótu upp í morgun, og sambært greinarum er tað óttin fyri ófriði í Miðeystri, sum er orsøkin. Prísurin fór upp í góðar 99 dollarar fyri tunnuna, og norðsjóvaroljan fór upp í 114,6 dollarar. Tað hevur ljóðað, at USA, Ísrael og onnur lond umhugsa at bumba iranska kjarnorkuútbúnaðin. Altjóða kjarnorkueftirlitið IAEA hevur júst kunngjørt eina frágreiðing, sum kemur við hvøssum atfinningum at iranska kjarnorkupolitikkinum. Iran er tann næststørsti oljuframleiðarin í tí arabiska heiminum, og gitingar um møguligt álop á landið órógva tí oljumarknaðin.

